vegis danskt, sum teir samstundis skulu læra fyri fyrstu ferð, eri eg stórliga bangin fyri, at hetta fer at elva til óneyðuga nógva málsliga ørkymlan hjá børnunum, og tá er lítið vunnið, heldur Karin Jóhanna.

### Fyrst føroyskt

Uttan mun til, hvat vit velja at gera framyvir, má avgerðin byggja á veruligar kanningar av málsligu førleikunum hjá føroyingum, heldur enn einstakar persónligar søgur og so gitingar fyri rest, slær Karin Jóhanna fast. Av onkrari orsøk hava myndugleikarnir ikki viljað brúkt pengar uppá ella hildið tað verið nóg neyðugt við slíkum kanningum. Tískil vita vit lítið um veruligu fremmandmálsligu førleikarnar hjá føroyskum nemingum í mun til onnur lond og enn minni um, hvønn hugburð næmingarnir hava til danskt ella føroyskt. Fata teir til dømis danskt sum eitt hent amboð til at ogna sær vitan, er tað jú gott. Men kenna teir danskt sum eitt haft um beinini, teir eru noyddir at dragast við, tí nóg gott frálærutilfar ikki er til á føroyskum, verður danskt ongantíð ein brúkiligur lykil til hvørki enskt, týskt ella franskt tíansheldur nakað annað fremmandamál.

Besta fortreytin fyri at læra eitt fremmant mál verður altíð, at næmingurin hevur so gott innlit í móðurmálið, sum til ber. Men í Føroyum er tað nógv, ið bendir á, at nógvir næmingar hava ilt við at kenna málið, teir hava lært heimanífrá, aftur í tí føroyska, teir læra í skúlanum.

– Um hetta er støðan sum heild, merkir tað kanska, at nógvir føroyskir næmingar í veruleikanum ongantíð hava fingið tað grundleggjandi innlitið í teirra móðurmál, sum átti at tryggja teimum mest natúrligu inngongdina til eitt fremmant mál. So leingi ein næmingur ikki veit, hvussu eitt føroyskt sagnorð sær út, kanst tú ikki vænta, at hann fer at kenna enska sagnorðið aftur. Og so leingi vit íkki vita, um tað er her, ein partur av trupulleikanum fjalir seg, tykist tað høpisleyst at sita og kjakast um, hvussu nógv fleiri fremmandamál vit skulu fylla inn í 3.flokksfrálæruna, sigur Karin Jóhanna.

### Fólkahoyring

Sjálv skýtur Karin Jóhanna upp, at skipað verður fyri eini fólkahoyring um hetta málið, áðrenn farið verður víðari við tí. Fólkahoyringar hækka støðið í almenna kjakinum - serfrøðingar, politikkarar og onnur koma saman at viðgerða evnið soleiðis, at tað verður lýst frá øllum síðum. Í hesum førinum tryggjar ein fólkahoyring, at avgerðir um mál og málpolitikk verða betri funderaðar enn nú, samstundis sum hetta styrkir fólkræðið.

– Myndin, vit hava beint nú, er, at avgerðin um at flyta enskt úr 5. flokki niður í 3. flokk er ein avgerð, landsstýrismaðurin hevur tikið einsamallur. Samstundis vita vit, at løgtingið hevur sett sær fyri at orða ein almennan føroyskan málpolitikk. Eg kundi gott hugsað mær at vita, hvar avgerðin hjá landsstýrismanninum kemur inn í tann yvirorðnaða málpolitikkin hjá Føroya Løgtingi, tí eg fái meg illa at trúgva, at ein slík avgerð er tikin leysrivin frá øllum øðrum, sum hendir á málpolitiska økinum, sigur Karin Jóhanna.

### Fordómar ella veruleiki?

Ein heilt annar spurningur, vit áttu at sett okkum, er, hví vit í grundini halda tað vera so átroðkandi neyðugt, at teir yngstu næmingarnir skulu læra júst enskt sum eitt tað fyrsta fremmandamálið. Tá nú øll tykjast sannførd um, at enskt fer at halda á at troka seg inn á okkum allastaðni frá, uttan mun til um vit vilja tað ella ei, hví so ikki læra børnini okkurt annað fremmandamál í staðin, spyr Karin Jóhanna og vísir á, at tað jú ikki er nøkur lóg, sum sigur, at vit treyaleyst skulu halda dyrnar inn til føroyska fólkaskúlan víðopnar fyri fríu, altjóða marknaðarkreftunum á málpolitiska økinum. Men slíkir tankar krevja ikki bara, at vit hava ein málpolitikk, men eisini at vit tora at seta spurnartekin við ivasom rák og illa funderaðar pástandir.

– Til dømis vísir ein meting hjá United Nations Development Programme, at bert 1 út av 10 heimsborgarum tosar enskt, men vit uppføra okkum framvegis sum at øll í verðini duga at tosa enskt. Tað er rætt, at enskt gevur atgongd til stóran part av Vesturheiminum, men vit hava lyndi til at gloyma, at tað finst ein heimur uttan fyri Vesturheimin. So kanska tað kann hugsast, at tað í veruleikanum er okkara fordómur um, at øll verðin tosar enskt, sum er ein størri forðing, enn okkara møguliga vantandi málsligu førleikar, sigur Karin Jóhanna Knudsen.

Jógvan á Lakjuni:

# Enskt er gongda leiðin

– Nógvir føroyingar duga avbera væl enskt. Men sum heild haldi eg ikki, teir duga nóg væl, og tí kunnu vit ikki bara lata standa til, sigur Jógvan á Lakjuni, sum tí hevur sett uppskot fram um, at ensktfrálæran skal byrja í 3. heldur enn í 5.flokki, sum nú

MÁLKJAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, er sannførdur um, at soleiðis sum rákið hevur verið seinastu árini, er tað als ongin ivi um, at enskt er tað málið, sum gevur lættastu atgongd til flest lond og vitanarøki.

– Uttan mun til, um okkum dámar hesa gongd ella ikki, er hon ein veruleiki, vit verða noydd at fyrihalda okkum til, tí fyrsta treytin fyri at vit kunnu gera okkum galdandi í framtíðarsamfelagnum er, at vit megna at samskifta við umheimin, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Ikki undirmeta danskt

Hóast landsstýrismaðurin ongar ítøkiligar kanningar hevur at halda seg til, er hann ikki í iva um, at neyðugt er at betra um fremmandmálsligu førleikarnar hjá føroyingum. Og hóast tað ikki finnast ítøkilig prógv um, at jú fyrr næmingar læra eitt fremmandamál, jú betri fara teir at duga tað, heldur hann tað framvegis vera eina gongda leið at flyta byrjunarfrálæruna í enskum úr 5. niður í 3. flokk

– Tað sigur seg sjálvt, at jú longri tú hevur havt eitt fak í skúlanum, jú betri møguleika hevur tú fyri at gerast dugnaligur í tí. Ein natúrlig avleiðing av hesum vildi eitt nú verið, at skúlin hækkaði krøvini til próvtøkurnar í enskum í teimum eldru flokkunum til ta tíð. Sum er, er til dømis ongin skrivlig próvtøka í enskum í 9. flokki, men við tvey ára longri frálæru í fakinum, hevði tað verið upplagt at tikið tann skrivliga partin við eisini.

Jógvan á Lakjuni er ikki bangin fyri, at tað enska fer at órógva hina málsligu frálæruna ella ørkymla næmingarnar, og sum er, eru ongar ætlanir um at lata frálæruna í donskum byrja seinni.

– Vit eiga at ansa eftir, at vit ikki undirmeta týdningin av, at føroyskir næmingar eru so stinnir í donskum, sum teir eru. Kanningar vísa til dømis, at føroyskir næmingar eru teir, sum eru best fyri í teimum Norðurlendsku málunum sum heild, og tað er ongin ivi um, at hetta hongur saman við einum góðum grundstøði í donskum. Tí verður heldur ikki talan um, at seta enskt í staðin fyri danskt, sigur Jógvan.



*- Vit eiga at ansa eftir, at vit ikki undirmeta týdningin av, at føroyskir næmingar eru so stinnir í donskum, sum teir eru, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum*

Hetta er tó ikki einasta orsøkin til, at landsstýrismaðurin ikki hevur ætlanir um at nerta dansktfakið hesum umfari. Ger hann tað, er hann bangin fyri, at vit enda aftur í sama gamla kjakinum um, nær dansktfrálæran skal byrja við tí úrsliti, at als onki hendir.

### Eftirlýsir kjak

Landsstýrismaðurin ásannar, at best hevði verið, um vit høvdu ítøkiligar kanningar av fremmandmálsligu førleikunum hjá føroyingum at halda okkum til, men at vit ikki hava tær eigur ikki at vera orsøkin til, at vit bara lata standa til og onki gera.

– Fyrr ella seinni má ein avgerð takast, men uppskotið skal ikki skiljast sum einasta og endaliga loysnin á hesum málinum. Hetta er líka so nógv eitt upplegg til kjak, og tað undrar meg stórliga, at ikki fleiri hava nýtt høvið til at koma við viðmerkingum og øðrum sjónarmiðum, sigur Jógvan og vísur aftur, at hann skal vera komin við hesum uppskotinum uttan at hava ráðført seg við onnur. Bæði fólk í mentamálaráðnum og onnur, ið hava ein fingur á pulsinum, hava verið við í arbeiðinum, sigur landsstýrismaðurin og leggur afturat, at ongin skal vera í iva um, at hann framvegis heldur enn fegin vil hava eitt so breitt og fjøltáttað kjak um hetta málið, sum gjørligt.

Spurdur um, hvønn leiklut hetta uppskotið hevur í einum størri málpolitiskum høpi, sigur Jógvan á Lakjuni, at fyribils er ætlanin bert at gera teir yngru næmingarnar varisliga kunnugar við teirra fyrsta veruliga fremmandamál eitt sindur fyrr. Samstundis vísir landsstýrismaðurin á, at málpolitikkur saktans kann fremjast í verki aðrastaðni enn innanhýsis í føroysku skúlaskipanini. Hann vísir á, at so seint sum í heyst kom ein kunngerð í gildi um at veita lán til málskúlauppihald á europeiska meginlandinum. Skipanin virkar soleiðis, at fer næmingurin undir hægri lestur í viðkomandi landi innan eitt ár, verður lánið at meta sum útbúgvingarstuðul, ið ikki skal gjaldast aftur.

– Hetta er bara eitt av nógvum átøkum, sum verða gjørd fyri at stimbra hugin og gera tað lættari hjá teimum ungu at fara undir útbúgving aðrastaðni enn í Norðurlondum og teimum enskttalandi londunum, samstundis sum tey læra seg onnur mál og menna tvørmentanarliga førleikar, sigur landsstýrismaðurin.